# Allir mínir høsnarungar

Stutt vegleiðing um, hvussu spælt verður.

**Ein luttakari verður valdur at verða hønumamma.**
**Ein annar luttakari verður valdur at verða úlvurin.**

**Restin av luttakarunum eru høsnarungar.**

Hønumamman stendur yvirav høsnarungunum, sum standa móti einum veggi ella garði, umleið einar 15 - 20 metrar burturfrá. Úlvurin stendur á síðulinjuni.

Síðani rópa hønumamman og høsnarungarnir til hvønn annan soleiðis:

Hønumamman: "Allir mínir høsnarungar, komið heim"

Høsnarungarnir: "Vit tora ikki"

Høsnumamman: "Fyri hvørjum?"

Høsnarungarnir: "Úlvinum"

Hønumamman: "Hvat ger hann?"

Høsnarungarnir: "Etur okkum"

Hønumamman: "Komið allíkavæl"

Síðan skulu høsnarungarnir renna yvir til mammuna, meðan úlvurin roynir at fanga teir.

Teir høsnarungarnir ið verða fangaðir, hjálpa síðani úlvinum at fanga høsnarungar næstu ferð.



GIGNI
Heilsufrøði til børn & ung

Niels Finsensgøta 37 · Postboks 132 · 110 Tórshavn · Tlf:562 300 · www.gigni.fo